**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# FM fyri lið á Føroyaleikum 2022



| | |
|---|---|
| **Dagfesting**: | 2. juli 2022 |
| **Svimjihøll**: | Páls Høll - 6 x 50m innandura svimjihylur |
| **Adressa**: | Á Oyrunum 17, FO-900 Vágur, www.palsholl.com |
| **Luttakarar:** | Allir svimjarar sum hava føroyskan svimjitjóðskap |
| **Innboðin feløg:** | FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir |
| **Tilmelding:** | Tilmelding fer fram á www.data.tempus.fo og á www.foroyaleikir.fo |
| **Tilmeldingarfreist:** | 30.mai 2022 |
| **Umsóknarfreist til startfelagsskap:** | Umsókn skal sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi 25.mai 2022 |

***Í samstarvi við***

FØROYALEIKIR 2022

ATLANTIC AIRWAYS

## FM fyri lið kapping

Kappingin verður skipað sum liðkapping fyri kvinnur og fyri menn. Hvørt felag kann stilla upp við einum liði fyri menn og einum liði fyri kvinnur. Um felag/feløg ikki fáa manna lið, kann start-felagsskapur skipast millum feløg. Umsókn um start-felagsskap skal sendast SSF (Svimjinevndini) í seinasta lagi 25.mai kl.23.59. Í umsóknini skal greiðast frá, hví start-felagsskapur ynskist, og hvørji feløg og hvørjir svimjarar eru í start-felagsskapinum.

## Stevnupartur

Kappingin verður gjøgnumførd í einum stevnuparti.

## Kappingarleistur

Kappast verður um stig, eftir leisti fyri liðkappingar, sum finnist í Wingrodan-skipanini.
Nr. 1 í hvørjari kapping fær 7 stig, nr. 2 fær 5 stig, nr. 3 fær 4 stig, o.s.fr.

Í liðsvimjing telja úrslitini dupult, tvs. nr. 1 fær 14 stig, nr. 2 fær 10 stig, nr. 3 fær 8 stig, o.s.fr.

Tað eru 10 einstaklinga kappingar og tvær liðkappingar, fyri kvinnur, ávikavist fyri menn.

Liðini skulu telja 5 ella fleiri svimjarar.
Luttakandi feløg skulu stilla upp við einum luttakara í hvørjari kapping og tað eru ikki kravtíðir til kappingina.

Hvør svimjari kann í mesta lagið svimja tvær (2) einstaklinga kappingar, og tvær liðkappingar.

Feløgini skifta geil frá kapping til kapping (rullandi).

Í mesta lagi 6 lið kunnu luttaka fyri kvinnur, ávikavist fyri menn.

Kappingin skal vera góðkend, so met og krav tíðir kunna setast.

Steyp verða latin til vinnandi liðini hjá kvinnum og hjá monnum, og medaljur verða lætnar øllum luttakandi svimjarum hjá teimum feløgum sum gerast nr. 1, 2 og 3.

## Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í Páls Høll 1 tíma áðrenn stevnupartin.
Tekniskur fundur fyri venjarar er í Páls Høll 1½ tíma áðrenn stevnupartin.

ATLANTIC AIRWAYS

**Kappingarskrá**

| **FM fyri lið - Pálshøll - Leygardagin 2 juli 2022, kl. 14.00** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Kapping 1 | 4 x 100 blandað | kvinnur | Kapping 2 | 4 x 100 blandað | menn |
| Kapping 3 | 200 bringu | kvinnur | Kapping 4 | 200 bringu | menn |
| Kapping 5 | 50 rygg | kvinnur | Kapping 6 | 50 rygg | menn |
| Kapping 7 | 200 blandað | kvinnur | Kapping 8 | 200 blandað | menn |
| Kapping 9 | 100 firvald | kvinnur | Kapping 10 | 100 firvald | menn |
| Kapping 11 | 200 frí | kvinnur | Kapping 12 | 200 frí | menn |
| Kapping 13 | 200 rygg | kvinnur | Kapping 14 | 200 rygg | menn |
| Kapping 15 | 50 firvald | kvinnur | Kapping 16 | 50 firvald | menn |
| Kapping 17 | 800 frí | kvinnur | Kapping 18 | 1500 frí | menn |
| Kapping 19 | 100 bringu | kvinnur | Kapping 20 | 100 bringu | menn |
| Kapping 21 | 50 frí | kvinnur | Kapping 22 | 50 frí | menn |
| Kapping 23 | 4 x 100 frí | kvinnur | Kapping 24 | 4 x 100 frí | menn |

**Upphiting kl.13.00. Kappingin byrjar kl.14.00.**

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er Marlon Kjærbo og stevnuskrivari Atli Vestergård.

Yvirdómari er Katja Lervig og startari Elian Hansen.

## Dómarar og hjálparfólk

Føroysku feløgini skulu møta við fylgjandi fólki til uppgávurnar sum tíðtakarar, vendidómarar og svimjidómarar:

HS, SuSvim og Ægir: 5 fólk

FLOT, FS og Reysti: 2 fólk

Nøvnini skulu sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi mikudagin 29.juni 2022.

## Tilmeldingar

Stevna er partur av Føroyaleikum og skulu feløgini tí fráboða luttøku og gjalda fyri tilmelding til Føroyaleikir á https://flsvim.atgongumerki.fo/organizer/1218745/event, í seinasta lagi 30/05-2022.

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði er løgd á data.tempus.fo. Tilmeldingar skulu gerast og váttast á data.tempus.fo í seinasta lagi **fríggjadagin 17. juni 2022** klokkan 23.59. Hvørt felag fær sínar

tilmeldingar aftur sum innlisnar í stevnuforritið, dagin eftir at tær eru móttiknar, at kanna og um neyðugt rætta. Tikið verður ikki ímóti seinum tilmeldingum.

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til og við **fríggjadagin 17. juni 2022**. Tá er luttøkugjaldið frá ÍSF ísv Føroyaleikir ikki roknða uppí
SSF ger upp luttøkugjøld fyri svimjarar og liðsvimjingar hjá feløgunum, at gjalda í seinasta lagi **fríggjadagin 24. juni 2022** til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.
Um luttøkugjald ikki er goldið tá luttakara listin skal almannakunngerast, verður felagið strikað av luttakaralistanum.
Goldin luttøkugjøld verða ikki endurgoldin, uttan so at talan er um tekniskan feil, t.d. at tann, ið flutti kom til at skriva skeiva upphædd í flytingini.

## Frámeldingar

Feløg kunnu frítt melda svimjarar og lið frá, fram til fríggjadagin **1. juli kl.12.00**, t.e. dagin fyri stevnu.
Aftaná hetta, má felagið vísa á serliga, óvæntaða orsøk, um ikki væntandi uppmøting skal geva bót.
Hesar orsakir kunnu t.d. vera brádliga íkomin sjúka, skaði, ella persónlig orsøk sum ikki ynskist lýst.
Felagið skal lata stevnuleiðsluni hesa frámelding, við grundgeving um orsøk, á skrift í seinasta lagi 30 minuttir aftaná viðkomandi start.
Svimjarar sum á hendan hátt eru frámeldaðir aftaná røttu frámeldingartíð, eiga ikki longur at luttaka á stevnuni, uttan við serligari góðkenning frá stevnuleiðsluni.
Væntandi ella ikki góðtikin frámelding, viðførir bót á 500 kr pr. start, eins og luttøka í kapping aftaná væntandi uppmøting altíð vil føra við sær eina bót á 500 kr pr start í øllum tí sum viðkomandi ikki møtti til.

## Klagur

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF umvegis ssf@ssf.fo við gjald á kr 500.

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo